# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 20.06.2022 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-68-2022: Innkomin boð uppá jørð til at heysta 2022.**
   Innkomnu boðini eru:
   **Støðlarnar – matr. nr. 390f:**
   Erhard Eyvindsson: kr. 820,00
   **í Sondunum – matr. nr. 145a:**
   Onki boð innkomið.
   **Avgerð**:
   Støðlarnar: Einmælt samtykt at leiga jørðina til Erhard Eyvindsson.

2. **102-44-2022: Umsókn um byggiloyvi til tilbygning á matr. nr. 56i, Hvalba.**
   Søkt verður um byggiloyvi til tilbygning á matr. nr. 56i, Hvalba. Støddin á útbygninginum er 7,2 m2 og verður bygdur í mark, grannaloyvi er viðlagt.
   **Teknisks nevnd 13.06.2022:**
   Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum í sambandi við brunaviðurskifti. Byggiloyvið er galdandi í tvey ár.

3. **102-60-2022: Umsókn um byggiloyvi til hjall á matr. nr. 434e, Sandvík.**
   Søkt verður um byggiloyvi til hjall, stødd 7,5 m2.
   **Tekniska nevnd 13.06.2022:**
   Nevndin mælir til, tá hjallurin er minni enn 10 m2, at geva loyvi til byggingina, treytað av, at bygt verður 2,5 m frá markinum.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekning, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi.

4. **102-42-2022: Skriv frá borgara um vatntrupulleikar.**
Skriv frá borgara um trupulleikar av vatni, ið rennur av vegnum inn á ogn teirra.
**Tekniska nevnd 13.06.2022:**
Nevndin mælir til, at kommunan leggur eina vegrist framvið innkoyringini vestanfyri húsini, sum skal taka vatnið, sum rennur av vegnum inn í túnið.
**Vega- og havnanevndin 25.04.2022:**
Nevndin mælir til, at borgarin fær eina vegrist, ið røkkur yvir økið umleið 6 m og rør, ið kunnu leggjast frá vegristini yvir í ánna vestanfyri húsini norðaliga.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

5. **102-62-2022: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 18c og 18b, Hvalba.**
Søkt verður um, at matr. nr. 18c letur umleið 205 m2 til matr. nr. 18b, í Nesi, Hvalba.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

6. **102-63-2022: Innkomin kostnaðarmeting Hamranes.**
Uppskot/kostnaðarmeting frá Jan Odmarsson frá LBF uppá at bøta um skaðan í verjugarðinum inn móti Hamranesi.
Íalt: kr. 40.000,00
**Vega- og havnanevndin 13.06.2022:**
Nevndin mælir til at taka undir við hesum uppskoti og fáa hetta gjørt.
**Fíggjarnevndin 20.06.2022:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við hesum uppskoti og um neyðugt játta møguligan eykakostnað kr. 10 – 20.000,00.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum og um neyðugt játta møguligan eykakostnað upp til kr. 30.000,00.

7. **102-64-2022: Dagstovnurin Brosið - umsókn um tímar til barnagarðsstovu.**
Søkt verður um 20 tímar eyka til barnagarðsstovu vegna serligan tørv.
**Trivnaðarnevndin 16.06.2022:**
Nevndin mælir til at játta umbidnu tímarnar.
**Fíggjarnevndin 20.06.2022:**
Samtykt varð við tveimum atkvøðum fyri at játta umbidnu tímarnar.

**Avgerð:**
Samtykt varð við seks atkvøðum fyri at játta umbidnu tímarnar.

**8. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.　　　　Fundur lokin kl. 19.15

| | | | |
|---|---|---|---|
| Janus Thomsen | Ronni Hammer | Niels Olaf Eyvindsson | Eir J. Norðberg |
| Gunnhild Mortensen | Thorstein Thomsen | Martin í Nesi | Poul Laust Christiansen |